# 8 spurningar um jól

**Elin Lindenskov**

***Hvat er tað besta við jólum?***
At dóttir mín kemur heim saman við sonunum og sjeikinum. Friðurin - hugnin saman við familjuni og vinum. Tankin um, at nú fer at gerast ljósari aftur.

***Hvat er tað keðiligasta við jólum?***
Myrkrið, at tað er so ótrúliga myrkt her um okkara leiðir um jóltíðir. Men so er gott, at vit hava jólini, tey seta ein serligan dám á og gera tað lættari.

***Hvussu helt tú jól sum barn?***
Jólaaftan oftast í barnaheiminum í Tórfinsgøtu. Vit ótu og pakkaðu pakkar upp saman við foreldrunum, ommu og abba. Aftaná vóru vit saman við pápasystrunum og teirra familjum, sum eisini búgva í grannalagnum, tað var altíð stuttligt og hugnaligt, tí vit vóru so nógv. Vit eru 12 systkinabørn, fleiri rættuliga javngomul, uppvaksin í grannalagnum, so har var lív í.

***Hvussu heldur tú jól í ár?***
Saman við familjuni á sama hátt sum tey felstu.

***Hvat heldur tú um jólaresið í desember?***
Tað eru sum vit sjálvi gera tað til. Tað nýtist ikki at gera so nógv burturúr. Eg velji ikki at lata meg draga so nógv við, tó slepst ikki heilt undan. Vit áttu at lært okkum at slappa meira av hóast øll tilboðini.



***Hevur tú nakrantíð hildið jól uttanlands?***
Nei, ikki enn.

***Keypir tú sjálv tínar jólagávur?***
Ja, ella geri eg tær sjálv.

***Hvat ynskir tú tær í jólagávu?***
Tann besta jólagávan er at vera saman við familjuni og vinum.


























